UPPLIVINGAR ÚR GERANDISDEGNUM
FRÁ 1907 TIL DAGIN Í DAG

# LLINI HJÁ CHRISTIAN MARTINI



Frá miðskeiðis í 1920unum til miðskeiðis í 1930 mól ein karrusell so lystiliga á Ingutrøð í Havn hvønn sunnudag klokkan 16. Karrusellin hjá Christian Martini Rubeksen verður vakt aftur til lívs á filmsfløguni Føroyskar Søgur

øllum hugsandi stórdjórasløgum, so einki er at siga til, at børnini flokkaðust í garðinum hjá Christian Martini á Ingutrøð. Rigmor Restorff minnist karrusellina í bókini »Meðan løtur líða 3« eftir Marionnu Debes Dahl:

»Eg minnist karrusellina hjá Christian Martini – Harragud, sum tað var eitt upplivilsi, altso. Tað var sanniliga ein flott karrusell – har vóru bæði hestar og løvur, súkklur og sletur, ja alt møguligt. Mann føldi seg, sum mann var ein Adonis, tá mann sat í henni. Eg haldi, at tað kostaði 25 oyru ein túrur. Altso, sum eg spelaði út við varu, út á Argir og niðan á Landavegin og oman í Rættará at fáa pengar at sleppa í karrusellina hjá Christian Martini. Tann eina dagin hevði eg koyrt so nógv, at eg spýði. Eg haldi, at eg hevði koyrt einar tíggju túrar. Tá slapp eg ikki aftur í karusell í eina heila viku. Men tað var mín egna skyld, eingin bað meg vera so býtta.«

Tað verður sagt, at eina ólavsøku var einki eittoyra ella tveyoyra eftir í býnum, tí øll vóru tey brúkt upp á karrusellina. Og um kvøldið, tá Christian Martin hevði stongt og koyrt presendingina omanyvir, sníktu tey ungu seg inn undir presendingina og fingu sær eitt ólavsøkufríggj.

## Ringar í sjónum

Sum so mangan fekk eisini hesin leikur bráðan enda, og sum so mangan vóru tað norðmenn, ið spiltu spælið. Miðskeiðis í tríatiárunum vitjaðu norskir skótar í Føroyum. Eisini teir vildu royna karrusellina, 30 vóru teir í tali, og allir fóru í senn upp á karrusellina. Tá vildi hon ikki meir. Onkur ásur brotnaði ella bognaði, og eingin karrusell fór aftur at mala í Havn.

– Eg haldi ikki, at pápi legði nakað í tað. Hann var troyttur av at reka karrusellina. Mamma var beinleiðis hjartans fegin um tað, ið hendi, staðfestir Ejler Rubeksen læandi.

Tá karrusellin var steðgað med alla, spjaddist tilfarið úr henni kring býin, áðrenn hon at enda varð høgd niður. Karruselldjórini vórðu skift í ymsar ættir. Dreingirnir hjá Christian Martini, ið vóru tríggir í tali, fingu hvør sín hest, somuleiðis Georg, bróðirin, sum búði í Tróndargøtu. Tann hesturin endaði í Bergen, hagar Georg flutti við húski eftir kríggið í 1945. Tá sjónleikir vórðu framførdir í Losjuni í Havn, var pallurin vakurt skrýddur við reyðum floyal og glitrandi baldýring frá karrusellini. Og børnini, sum búðu í Ingutrøð, fingu hvør sína floytu úr lírukassanum. Søgur gingu um hvøllu floytuljómanina úr Ingutrøð.

Tey, ið vilja uppliva eitt lítið petti av hesi legendarisku karrusell, kunnu støkka inn á gólvið í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Leyvan, sum stendur á trappuni í Miðlahúsinum í Vágsbotni, er somuleiðis ein av ævintýrlutunum úr karrusellini hjá Christian Martini. Hana eiga synirnir hjá Williami Heinesen. Hon prýddi eisini trappurnar, bæði tá Zacharias Heinesen og Valdemar Lützen handlaðu í søguliga húsinum í Vágsbotni.

*Uni L. Hansen*

Keldur:
»Karusellin hjá Christian Martini Rubeksen«, Sosialurin, 15. apríl 2005
»Meðan løtur líða 3«, Marianna Debes Dahl, Fannir 2002
Privatar endurminningar eftir Mourits Rubeksen (1927-2006)



Lítið ánaði kendi havnarmarðurin Christian Martin Rubeksen, at úrslitið av einum túri í Tivoli í Keypmannahavn miðskeiðis í 1920árunum fór at vera, at hann bleiv tann »erni« ánarin av einari ordiligari tivoli-karrusell

Mynd: Fornminnissavnið 7111F0094



Filmskutið av karrusellini hjá Christian Martini Rubeksen kom undan kavi á elstu privatu filmsrullu, ið higartil er funnin í sambandi við verkætlanina Føroyskar Søgur. Tað er Rannvá Olsen í Havn, ið hevur arvað filmsrulluna eftir langabbabeiggjan Ingvald Olsen

Mynd: Birgir Kruse